RIMMAR ÚTSØLA

SONJA DESIGN
Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979
(Oman fyri Lágargarð)

byrjar hósdagin 3. januar kl 10:00 - Kom og ger kvettið

Vit rudda út, áðrenn øll tann nýggja vøran kemur heim

- 30% og - 50% av meturvørum, klæðum og prýði

| | |
|---|---|
| Mánadag-hósdag | kl. 10.00-14.30 |
| Fríggjadag | kl. 10.00-18.00 |
| Leygardag | kl. 10.00-14.00 |

Sosialurin - 311820

# Polarhav og Stjørnan fingið væl av fiski

**– Vit fara helst at síggja munandi betri fiskaprísir nú í byrjanini av árinum enn í jólavikuni, heldur Jason Johannesen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*– Tað er torført at siga, hvar fiskurin hjá Polarhavi og Stjørnuni endarhesaferð, tí helst vilja nógvir hava fatur á honum, sigur Jason Johannesen*

Tá ið vit frættu av Fiskavirking í Saltangará mikumorgunin, skiltist, at leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, sum fóru útaftur 3. jóladag, hava fingið væl av fiski seinastu dagarnar.

Hetta visti Jason Johannesen at siga. Hann visti tó ikki, hvussu nógv teir hava fingið.

– Vit plaga at keypa fiskin hjá hesum báðum trolarunum, men vit vænta, at nógvir verða um boði at keypa hesaferð, tí eingin fiskur er á marknaðinum. Nær skipini koma innaftur at landa, visti stjórin á Fiskavirking í Saltangará ikki at siga.

## Góðar sølur uttanlands

Jason Johannesen væntar, at fiskaprísirnir nú beint eftir nýggjár verða munandi betri enn prísirnir í jólavikuni, tá ið so nógvur fiskur var á marknaðinum.

– So, tað er torført at siga, hvar fiskurin hjá Polarhavi og Stjørnuni endar hesaferð, sigur hann. Stjórin vísir á, at nøkur skip vanliga plagdu at fara útaftur 2. ella 3. jóladag ogso landa fyrstu lastina uttanlands, um fiskiskapurin eydnaðist væl.

– Eingin fiskur er á útlendska marknaðinum beint eftir ársskiftið, og tá plagdu hesi skipini oftast at fáa hava eina góða sølu, sigur Jason.

## Bert okkurt smávegis

Mikudagin var skrivstovufólkið, maskinmenninir og formenninir til arbeiðis á Fiskavirking í Saltangará, men tað var ikki tað stóra, tey tókust við, skilst.

– Bøtt verður um okkurt smávegis, meðan einki fiskaarbeiði er, men hetta er bert vanligt smávegis viðlíkahald.

Jason sigur annars, at arbeiðsfólkið á virkinum hevur havt frí síðan hósdagin fyri jól, og vanliga fer ein vika av nýggja árinum, áðrenn verulig gongd kemur á aftur.

– Men keypa vit fiskin hjá Polarhavi og Stjørnuni, verður helst farið tilarbeiðis aftur ein av fyrstu døgunum, sigur hann.

# Føroyskir fiskimenn uttanlands havt aðalfund

**Felagið fyri føroyskar fiskimenn uttanlands hevði aðalfund í Norðurlandahúsinum fríggjadagin**

FISKIVINNA
*Tíðindaskriv*

Á fundinum var Hermann Oskarson gestarøðari, og røddi hann um búskap og legði upp til kjak.

Fundurin var samdur um at arbeiða víðari við málinum um at fáa fiskimenn loystar úr samdøgurfrádráttinum fyri handverkarar og heldur at royna at fáa skipanina, ið fyrr var brúkt, setta aftur í gildi.

Í nevndina var Johan A. Hansen valdur fyri Birgir Lützen. Hann umboðar fiskimenn í Kanada. Jógvan Fagraklett heldur fram sum umboð fyri fiskimenn í Danmark og Høgni Waag Høgnesen heldur fram sum umboð fyri fiskimenn í Noreg

# Skipini útaftur seinni í vikuni

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tá ið Sosialurin ringdi til Fiskavirking á Tvøroyri mikumorgunin, svaraði telefonin heldur óvæntað. Vit hugsaðu, at kanska var okkurt at gera á virkinum hendan mikumorgunin, beint eftir ársskiftið. Kanska hevði virkið keypt útróðrarfisk teir báðar dagarnar millum jól og nýggjárs. Men so var ikki.

– Her er bara skrivstovufólkið og maskinmenninir til arbeiðis. Vit hava ongan fisk, og tað verður nokk heldur ikki nakað serligt fiskaarbeiði aftur, fyrr enn skipini, sum fara útaftur seinni í hesi vikuni, koma innaftur at landa. Og tað ganga so altíð nakrir dagar, um veðrið heldur sær. Spurdir, um nakrar umvælingar eru farnar fram á virkinum, meðan fólkið hevur verið í jólafrí, siga tey á Fiskavirking, at so er ikki.



*Øll fiskivinnan á Tvøroyri, bæði á sjógvi og landi, hevur »hvílt seg« um jólini*

– Nei, vit hava bara hildið frí. Her er einki serligt gjørt við virkið.

## Útróðurin hevur eisini »hvílt seg«

Útróðrarbátarnir á Tvøroyri, sum annars hava fingið væl av fiski í vetur, vóru ikki úti hósdagin og fríggjadagin millum jól og nýggjárs, og sum skilst, loystu teir heldur ikki mikudagin.

Streymurin hevur verið nakað harður, men tað vardi stutt hesaferð.

Á Tvøroyri vænta tey ikki nakað serligt fiskaarbeiði, fyrr enn um einar 10 dagar ella so.



Vælupplagdur ársfundur í Klaksvík:

# Fiskimaðurin vil hava annað enn pengar



*Væl av fólki var møtt til ársfundin hjá Føroya Fiskimannafelag*

*Mynd: Jústinus L. Eidesgaard*

FISKIVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Klaksvík:** Hóast sáttmálasamráðingar liggja fyri framman, so var tað ikki akkurát pengar, sum vóru fremst á skránni, tá Føroya Fiskimannafelag helt ársfund seinasta fríggjadag í Skáanum í Klaksvík.

Trygd á sjónum, betri liviumstøðum umborð, størri kømur, parabol, sjónvarp, venjingarhøli til manningina, meira tíð heima og greiðari tryggingarviðurskiftir í samband við arbeiðsskapar vóru nøkur av evnunum, sum vóru tikin fram á ársfundinum. Um orsøkin skal finnast í at fiskimenn hava havt eitt fram úr gott inntøkuár í fjør ella um fiskimaðurin er vorðin meira tilvitaður um trivnaðin umborð, kom ikki greitt fram á ársfundinum, men ein sannroynd er, at framtíðar føroyski fiskimaðurin vil hava internetsamband, sjónvarp og annað at stytta sær stundir við, tá hann hevur frí umborð.

Og at føroyski fiskiflotin er gamal og ómodernaður, at tað er óliviligt umborð á nógvum skipum, er nakað sum upptekur fiskimenn. Nógv føroysk skip eru gomul og hetta merkist eisini á trivnaðinum umborð og hetta gjørdu fiskimenn vart við á ársfundinum

-Oljuvinnan liggur fyri framman og treytirnar sum feløgini í oljuvinnunu hava at bjóða fólki eru nakrar heilt aðrar enn tær sum vit finna umborð á fiskiskipum í dag. Fiskivinnan skal ansa sær, tí kann hon ikki bjóða eins góðar treytir sum oljuvinna, so verða skipini mannleys, segði 24 ára gamli Rúni Borðoy, tá hann tók orðið á ársfundinum.

- Umborð á einum línubáti hevur tú tvinnar kostir í dag, tá tú hevur frí, antin at vera á kamarinum ella í messuni. Línubátarnir hava fýra til seks manns kømur og har ber illa til at vera, tá aðrir sova, so í veruleikanum hevur tú bara messuna. Tú eigur tveir fermetrar umborð á einum línubáti, tað er alt. Í oljuvinnuni hevur tú parabolsjónvarp, venjingarhøli, internet og allar møguligar hentleikar, sum kunnu stimbra trivnaðin. Umborð á línubátunum er einki, segði Rúni Borðoy.

Óli Jacobsen skilti ikki rættuliga hvussu tað kundi bera til, at plássið var so ringt umborð á línubátunum.

- Tá línubátarnir komu til landið vóru 26 manns við, nú eru bara 14, men um tey tómu kømurini verða nýtt til órudd, so skili eg tað betri. Fiskimannafelagið er av tí áskoðan, at tá skipaeftirlitið verður yvirtikið, so eigur hetta at fáa fíggjarligan karmar, soleiðis at tað eisini kann kannað eftir um treytirnar fyri trivnaði verða fylgdar umborð á skipum, segði Óli Jacobsen.



*Óli kom vit síni 31. formannsfrágreiðing, hann hevur sitið sum formaður ein triðinga av 90 ára søgu Føroya Fiskimannafelags*
*Mynd: Jústinus L. Eidesgaard*

## Nýggjur sáttmáli

Væl upplagdir fiskimenn, lurtaðu eftir ársfrágreiðingini frá fiskimannafelagsformanninum seinastu 31 árini, Óla .

Tað sást á monnum, at nú høvdu teir frí og at hesin dagurin skuldi fara til annað enn strev umborð. Pallurin var rættuliga settur til eina góða stevnu millum fiskimenn fríggja dagin millum jól og nýggjár. Tað sást longu umborð á Dúgvuni fyrr um dagin. Teir flestu ferðamenninir vóru fiskimenn, sum vóru á veg til Klaksvíkar at spæla fótbólt og at vitja ársfundin, sum hvørt ár verður hildin hesa tíðina. Og lítið pláss var eisini eftir á vánni. Tey flestu skipini vóru heima og tað kavaði megin partin av degnum.

Hvat lokkaði meira, sjálvur ársfundurin sum byrjaði klokkan fýra seinnapartin ella fótbóltskappingin, sum varð skipað millum manningar á føroyskum fiskiskipum allan er ilt at meta um. Av øllum teimum sum spældu fótbólt hendan dagin vóru teir á línubátinum Mascot av Toftum teir knáastu og vunnu kappingina. Ársfundurin varð hildin í Skáanum og seinni um kvøldið skipaði Fiskimannafelagið fyri døgurða og undirhaldið í KÍ høllini og her skuldu eisini steyp handast frá fótbóltskappingini.

## Óli hevur orðið

Og hóast munnliga formannsfrágreiðingin varð prentað í Fiskimannablaðnum, sum kom út sjálvan fundardagin og áhoyrararnir sostatt høvdu frágreiðingina prentaða, so sótu teir kúrrir sum undir lestri, meðan lurtað varð eftir formanninum, sum hevur verið formaður alt tað tilkomnir menn minnast

Óli nam við sáttmálaviðurskiftini og samráðingarnar sum lógu fyri framman og kom inn á eftirlønina.

- Eitt er givið, neyðugt er at fáa eina eftirlønarskipan, sum báðir partar skulu gjalda til, segði Óli Jacobsen.

Óli vísti aftur skuldsetingunum um, at Fiskimannafelagið hevði verið ov seint á sjóvarfallinum viðvíkjandi eftirlønunum. Nevndi at teir hava bíðað eftir eini lóggávu á økjunum, men at tað hevur gingið striltið hjá politikkarunum at gera sína skyldu í hesummáli.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum greiddi limunum frá, at hann var nøgdur við inntøkutrygdina hjá fiskimonnum.

- Stórt sæð kann sigast, at skipan við inntøkutrygd er sera rímulig og hon gevur fiskimonnum við teimum lægru inntøkunum eina reella trygd, tá tað ikki gongst væl í hond. Tað eru broytingar gjørdar, síðan skipanin upprunaliga kom í gildi, men prinsippini eru varðveitt sambært upprunaligu ætlanini, segði Óli Jacobsen.

Óli fegnaðist um góðu gongdina hjá fiskimonnum seinastu árini.

- Samanumtikið kann sigast, at seinastu fýra árini hava verið góð hjá fiskimonnum. Hetta merkir, at tey eisini hava verið góð hjá samfelagnum sum so, og hava vit enn einaferð fingið váttað, hvususnær tengd gongdin í samfelagnum er at gongdini í okkara høvuðsvinnu, segði Óli Jacobsen.

# Mintust Jákup Monrad



FISKIVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Klaksvík:** Áðrenn farið var undir ársfundin hjá Føroya Fiskimannafelag í Klaksvík, seinasta fríggjadag var høvi nýtt at minnast Jákup Monrad Joensen av Húsum, sum doyði fyrr í árinum og sum hevði verið ein so hollur stuðul hjá Føroya Fiskimannafelag. Jákup Monrad doyði á Norðoyarstevnu.

Óli Jacobsen, sum hevði havt tætt samband við Jákup Monrad í mong ár, greiddi fiskimonnunum frá, at Jákup var komin sjúkur heim av skipi og doyði stutt eftir. Jákup hevði siglt alt lívið og hann hevði verið ein sera góður stuðul hjá Fiskimannafelagnum.

Teir 150 fundarluttakararnir reistust og tøgn var ein góða løtu, har fiskimenn innantanna ynsktu frið yvir minnið um Jákup Monrad av Húsum.